Kirkjubøargarður
Farmhouse from the 11th century

Um Døgurða í Roykstovuni í Kirkjubø. Okkara og tykkara mannagongdir v.m.

**Av tí Roykstovan :**

- er heim okkara.
- er ikki eitt alment fornminnissavn
- er ikki ein almenn matstova.
- fær ongan almennan stuðul.
- hevur matstovu – og skeinkiloyvi.

**mugu tit sum bíleggjarar fylgja hesum mannagongdum**

- Bílegging má fara fram í góðari tíð.
- Neyvt tal av gestum má fráboðast seinast 3 dagar áðrenn tiltakið.
- Boða frá um serlig ynski eru, ella vit skulu taka serlig fyrilit. (t.d. vegetarar ella annað)

Harafturat vilja vit gera vart við at ikki er loyvt at taka egnar drykkivørur við.

Ein bólkur má telja minst 15 gestir og hægst 45 gestir.

Undantøk kunnu gerast niður um 15, hetta hevur tó eyka kostnað við sær.

Goldið verður fyri allan bólkin undir einum. Eru serlig ynski í bólkinum má hetta avgreiðast innanhýsis, áðrenn komið verður til gjaldingar.

Goldið verður kontant, um ikki onnur avtala er gjørd.

**Matarskrá**

**Durðasnapsur**
Skonktur úr Hanusi (gott 200 ára gamalt veðurlamshorn).

**Forrættur**
Ymiskt úr sjónum. Rækjur, laksur, jákupsskeljar v/grønmetisblandi
Hvíttvín

**Høvuðsrættur**
Lambskjøt av garðinum v/sós og grønmetisblandi, rabarbusúltutoy
Reyttvín

**Omaná**
Rabarbutrifla
Portvín

Frágreiðing um Roykstovuna og tað, ið inni er.

**Kaffi & Smákøkur**
Konjakk & Likørur

**Vit vilja veita:**

- Søguliga frágreiðing áðrenn farið verður til borðs, og eftir høvuðsrættin.
- Mat og drykkivørur
- Hugnaligt umhvørvið
- Góða tænastu, í 900 ára gomlu Roykstovuni.

Vit taka ímóti niðri við lendingina. Greitt verður frá søgum og sagnum. Døgurðin verður etin í Roykstovuni.

Kaffi verður í Stórustovu, meðan ruddað verður av í Roykstovuni, so at gestirnir fáa høvið at síggja Roykstovuna sum hon er.

Eitt slíkt tiltak byrjar vanliga kl 19.00 og er liðugt uml. kl 23.30, ella sum gestirnir ynskja tað.

Prísurin liggur í **miðal** um kr 800,- pr. persón alt íroknað, fyri eitt slíkt kvøld.

## Verið hjartaliga vælkomin

Guðrið og Jóannes Patursson
Sí annars heimasíðuna

Fyrivarni verður tikið fyri møguligum villum ella broytingum ið kunnu koma fyri.

Kirkjubøargarður v/Guðrið & Jóannes Patursson, FO- 175 Kirkjubøur, Føroyar
Tel + 298 32 80 89, Fax +298 32 80 70, joannes@patursson.fo www.patursson.fo